# Mazda CX-7 fyrst á amerikanska marknaðin



*Mazda CX-7 kemur á amerikanska marknaðin í vár. Bilurin er bæði lægri og breiðari enn fleiri av kappingarneytunum við lutfalsliga stórari aksilfrástøðu og stórum hjólum*

**Mazda hava í hesum døgum heimpremieru í Detroit av endaligu útgávuni av nýggja Mazda CX-7. Bilurin var fyrstu ferð sýndur fram í Detroit fyri júst einum ári síðan sum konseptbilurin Mazda MX-Crossport**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Orsøkin til at Mazda hava heimspremieru av CX-7 á bilaframsýningini í Detroit, er at bilurin fyrst kemur á amerikanska marknaðin í vár. Seinni kemur bilurin, sum verður framleiddur í Japan, á evropeiska marknaðin.

Mazda CX-7 er ein sonevndur Crossover, t.v.s. at bilurin er ein kombinatión av fleiri ymiskum biltypum við bæði sportsligum og SUV (Sport Utility Vehicle) eginleikum.

Í mun til longdina (467 cm) er CX-7 rættuliga breiður (187 cm), og hæddin er 165 cm. Bilurin er lægri og breiðari enn fleiri av kappingarneytunum, og við lutfalsliga stórari aksilfrástøðu kemur hann at liggja væl á vegnum.

Kabinan er bæði snøgg og sportslig við góðum plássi til fimm vaksnar persónar og teirra viðføri.

Á amerikanska marknaðinum fæst CX-7 bæði sum vanligur 4x4 og við nýggja framkomna 4x4 systeminum hjá Mazda, Active Torque-Split. Motorurin er ein 2,3 litur bensin við turbo og beinleiðis innspræning og 244 hk, saman við 6-trins automatiskum girkassa.

Enn eru ongir tekniskir upplýsingar komnir upp á evropeisku útgávuna av CX-7, og heldur ikki er avgjørt, nær bilurin kemur til Evropa.



*Mazda CX-7 er ein sonevndur Crossover, t.v.s. at bilurin er ein kombinatión av fleiri ymiskum biltypum*

# Opel GT frá 60-unum kemur aftur

**Á altjóða bilaframsýningini í Genéve í mars, avdúka Opel ein heilt nýggjan sportvogn, sum líkist Opel GT frá 60-unum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í hesum døgum síggja vit alt meira til nýggj bilmodell, sum líkjast bilum frá 50- og 60-unum. Vit hava sæð tað við t.d. VW New Beetle, Mini Cooper og Ford Mustang.

Nú er tað Opel, sum hava eina spennandi avdúking á bilaframsýningini í Genéve, sum verður fyrst í mars. Tað er bilurin, sum er undir presendingini á myndini, ein nýggja útgáva av Opel GT.



*Ovara myndin sýnir Opel GT frá 60-unum. Undir presendingini á niðaru myndini er nýggi sportvognurin, ið verður frumsýndur á bilaframsýningini í Genéve fyrst í mars*

Nýggi bilurin verður drivin av bakhjólunum, hevur 4 syl. motor, og designið líkist Opel GT, sum fyrstu ferð var sýndur fram á Frankfurt Motor Show í 1965, og kom á marknaðin í 1968.

Opel GT var framleiddur í yvir 100.000 eindum frá 1968-73, og síðan hevur bilurin verið eitt samlaraobjekt um allan heimin.

*Kelda: GM Danmark*